átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Eitt annað ríki



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

### "Ríki mítt er ikki av hesum heimi"

**Jóhannes 18,36**

Hetta svar gav Jesus Pilatusi, tá ið hann spurdi um Jesus var ein kongur. "Ríki mítt er ikki av hesum heimi" Jú, tað er satt. Ríki hansara er ei bert "av hesum heimi", men tað er í veru síni tað øvuta; har ræður ein heilt annar andi og har galda heilt aðrar lógir enn í hesum heimi.

Í Guðs ríki er Jesus sjálvur kongur, og har setur hann dám á alt við anda sínum, meðan Sátan er kongur í hesum heimi. Frá hesum báðum mótsattu kongum stavar eisini mótsetningurin í øllum - millum ríkini sjálvi og teirra lagnu, millum borgararnar í hesum báðum ríkjum, teirra kor, teirra sinn og levnað.

Yvir hesum heimi hongur myrkurs og deyðans andi. Heimurin skal einaferð ganga undir. Hann er dømdur til undirgangs, tí at høvdingin í hesum heimi er dømdur. Guðs ríki er harafturímóti ljósins, lívsins og sannleikans ríki. Allir borgarar tess eru ljósins børn, sum eiga ævigt lív. Guðs ríki skal ongantíð fara til grundar, men harradømi tess skal breiðast út allar vegir heilt til ytstu endamørk á jørðini.

Vilt tú vera borgari í hesum ríki, so ert tú saman við øllum teimum heilaga útvaldur úr heiminum til at verða eitt Guðs barn í Kristi. Tú kanst royna tað á tann hátt, at heimurin ikki longur er heim títt, men at tú saman við øllum Guðs børnum er fremmandur og útlendingur, hvørs borgaraskapur er á himnum.

Tað er ringt at kenna seg heima har, ið heimsins andi ræður, tí eitt slíkt menniskja hevur ikki stigið yvirum dýpið; men tað er gott, ja vælsignað, at kenna seg heima har, ið Guðs andi ræður, tí tá hava vit atgongumerkið til himmiríkið, tá ið vit fara higani. Amen!

# Fleiri føroyingar at lesa gudfrøði



*- Endamálið við DBI er at fremja bíbliutrúgva boðan, undirvísing og missión í Danmark og í útheimi, sigur 31 ára gamli Steen Eskildsen frá Dansk Bibel Institut* *Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Tað hava altíð verið føroyingar sum hava lisið her á DBI. Og fleiri skulu verða hjartaliga vælkomnir, sigur Steen Eskildsen, ferðaskrivari hjá Dansk Bibel Institut í Keypmannahavn.**

**Lestur:** Fyrr í mánaðinum var hann á kunningarferð í Føroyum. her hann greiddi frá um stovnin, har hann sjálvur lesur gudfrøði.

Steen hevur hildið møtir kring landið og hevur eisini prædikað við onkrar gudstænastur.

- Her havi eg hitt fleiri ung, sum hava víst hesum lesnaðinum stóran áhuga.

- Hugsandi er tí, at onkur teirra fer at lesa gudfrøði her hjá okkum. Her er í øllum førum gott at verða, sigur Steen.

Umframt kunningina hevur hann eisini hitt fólk og samkomur, sum stuðla virkseminum á DBI, annaðhvørt við gávum ella við forbøn.

### Trúskap móti Bíbliuni

DBI hevur í sløk 35 ár undirvíst komandi gudfrøðingum og prestum. Millum hesar hava eisini verið eitt stórt tal av føroyingum.

– Í løtuni eru eini 4-5 føroyingar her á DBI, sigur Steen.

Skipanin er hon, at tey lesandi verða innskrivað til gudfrøðilesturin á Københavns Universitet, men at tey eisini hava møguleika at fáa undirvísing á DBI – ofta í somu lærugreinum.

- Meðan ein aðrastaðni hevur lagt seg á eina atfinningarsama linju mótvegis Bíbliuni, leggja vit hinvegin dent á trúskap móti Bíbliuni.

- Tí kann ein hoyra eitt ávíst sjónarmið á eina lærustovninum og eitt annað á hinum. Soleiðis kann ein fáa báðar síður av somu søk at hoyra, sigur Steen.

Hann hevur lisið gudfrøði í nøkur ár, men er í løtuni ferðaskrivari hjá DBI. Enn veit hann ikki, hvat hann skal gera, tá lesturin er liðugur.

- Eg havi eisini lisið kunningartøkni og samskifti. So tað verður helst okkurt við, hvussu ein breiðir út Guds orð á ein annan hátt og á øðrum støðum enn júst í eini kirkju, slær Steen fast.

# Nýtt Blákrossheim á nýggjum staði

**Ein av fyrstu døgunum fer Nes kommuna at bjóða áhugaðum at grava út fyri nýggja Blákrossheiminum, ið skal byggjast á Nesi.**

**Nes:** Í longri tíð hevur felagsskapurin Blái Krossur kannað, um til bar at byggja nýtt viðgerðarheim uttan fyri høvuðsstaðin.

Fyri góðum mánaði síðani fekk felagsskapurin eitt skriv, har boðað varð frá at greitt er at fara undir ætlanina í Neshaganum.

Sambært Trúboðanum er talan um eitt viðgerðarheim í einari hædd og sum er 680 fermetrar stórur. Pláss verður fyri 15 fólkum í viðgerð.

Olga Magnussen, leiðari á Blákrossheiminum sigur, at tey valdu ikki at leggja viðgerðarheimið í Havn, tí har er rættiliga dýrt at byggja.

- Í Havn er so nógv at bjóða. Freistingin á bygd er ikki so stór sum í Havn, har tað bara eru 10 minuttir til næstu barrina.

- Her á Nesi kemur heimið at liggja sera væl fyri, sigur Olga.

Enn er ikki greitt, nær spakin verður settur í. Heldur ikki er greitt, hvat kostnaðurin av heiminum verður ella nær tað skal standa liðugt.

Blái Krossur er ein kristiligur fráhaldsfelagsskapur, sum millum annað hevur til endamál at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, og at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

## Nógv fólk til missiónsviku

**Leynar:** Mong ár eru liðin, síðani missiónsvika seinast varð hildin á Leynum.

Í farnu viku varð hetta kortini tikið uppaftur við møtum í skúlanum.

Hóast eini 9-10 ár eru liðin síðani seinastu missiónsvikuna, vóru sera nógv fólk til møtini.

Hugsandi er tí, at árliga missiónsvikan nú er komin fyri at verða.

## Søkja eftir urguleikara

**Skopun:** Kirkjan í Skopun ynskir nú at fáa ein fastan urguleikara settan í starv. Tí hevur kirkjuráðið tikið eitt heldur óvanligt stig, nevniliga at lýsa eftir einum urguleikara.

Í hesi kirkjuni, sum í ár verður 110 ára gomul, finst ein Frobenius-urga frá 1965 og sum hevur seks røddir.

Eingin tíðarfreist er sett, nær umsóknirnar skulu verða inni.

## Páskamáltíð eftir jødiskum siði

**Øravík:** Sunnudagin 25. mars skipar Ísraelsmissiónin fyri serstakari jødiskari páskamáltíð í Gistingarhúsinum í Øravík.

Hetta er ein máltíð, har øll familjan fær eina smakkiroynd av teimum jødisku páskarættunum.

Tiltakið varir í hálvan triðja tíma.

## Andakt mitt um dagin

**Ebenezer:** Arbeiðir tú í miðbýnum í Havn ella í har nánd, ber til at savnast til andakt á middegi hvønn mánadag.

Her er møguleiki hjá trúgvandi fólki at hava eina stilla løtu saman við Harranum. Løtan byrjar við upplestri úr Bíbliuni og síðani er bøn.

Andaktin er hvønn mánadag kl. 12.30 og varir í einar 20 minuttir.

Sosialurin